

Forstjórin í Shell, Ben van Beurden. Mynd: Shell

# Starvsfólkahópurin hjá Shell skal minkast við 6500 størvum

**Jógvan Hugo Gardar**

30.07.2015 - 11:37

Oljan.fo

Hollendski oljurisin Royal Dutch Shell boðar í morgun frá at sparest skulu minst fýra milliardir dollarar í 2015, og ein avleiðing er at 6500 størv skulu burtur. Og fyritøkan sigur samstundis at enn fleiri sparingar fara at koma í 2016. hetta skrivar hollendska blaðið Financieele Dagblad.

Forstjórin í Shell, Ben van Beurden, segði tá hann legði fram rokniskapin fyri fyrra hálvár, at tíðirnar eru truplar hjá oljufeløgunum, og tað einasta tey kunnu gera í løtuni er at halda eygu við at raksturin ber seg.

Ein sparing uppá fýra milliardir krónur hjá Shell merkir at fyri hvørjar tíggju krónur tey brúka í dag, so skal ein króna sparast av hesu tíggjukrónuni tað sum er eftir av 2015.

Umsetningurin hjá Shell er minkaður við 36 prosentum í øðruk ársfjórðingi, samanborið við sama tíðarskeið í 2014. Úr 115,3 milliardor dollarar til 74 milliardir dollarar.

Umframt at skera burtur 6500 størv, og at spara fýra milliardir dollarar, so skal íløguætlanin skerjast við 20 prosentum í 2015. Tað svarar til sjey milliardir dollarar.

Harafturat sigur leiðslan í Shell at íløguætlanin fyri 2016 verður tann sama sum í 2015, tað vil siga umleið 35 milliardir dollarar. Í hesum liggur eisini keypið av BG Group. Tað merkir so í veruleikanum at íløguætlanin hjá Shell verður munandi skerd í 2016, samanborið við í ár.